# Gullið verður handað í Klaksvík

**Bæði menninir hjá Fleyr og kvinnurnar hjá Drátti spæla ársins seinasta dyst í Klaksvík. Har fáa føroyameistararnir eisini handað steyp og gull eftir dystirnar leygardagin**

FLOGBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Eingin spenningur er undan seinastu dystunum í bestu mans- og kvinnudeildunum í flogbólti um vikuskiftið.

Menninir hjá Fleyr og kvinnurnar hjá Drátti hava tryggjað sær føroyameistaraheitið, og tá ið hesi lið spæla sínar seinastu dystir í Klaksvík leygardagin, eru teir uttan týdning.

Hjá monnunum spæla tey bæði bestu liðini í ár, Fleyr og Mjølnir. Klaksvíkingar vunnu steypafinaluna ímóti Fleyr, men í landskappingini hevur Fleyr havt munin. Mjølnir hevur tryggjað sær silvurið í landskappingini, so dysturin leygardagin snýr seg bert um heiðurin at vinna.

Hin dysturin hjá monnum leygardagin verður á Kambsdali, har SÍ og ÍF spæla. SÍ hevur vunnið bronsuna, meðan ÍF ikki kann broyta sína støðu sum nummar fýra í deildini.



*Leygardagin verða seinastu flogbóltsdystirnir í landskappingini spældir, og báðir føroyameistararnir í meistaradeildunum spæla í Klaksvík*

**Toppur og botnur**

Hjá kvinnum er tað toppur og botnur, sum hittast í Klaksvík. Dráttur hevur alt kappingarárið verið tað besta kvinnuliðið, meðan Mjølnir hevur havt tað trupult í ár. Mjølnir er við at spæla eitt nýtt lið saman, og tað krevur tol og tíð.

Mjølnir liggur aftast í deildini og skal spæla niðurflytingardyst ímóti Fleyr mitt í næstu viku.

Tveir aðrir dystir verða hjá kvinnum. Á Tvøroyri spælir næstfremsta liðið, TB, ímóti KÍF, og á Kambsdali verður dystur millum ÍF og SÍ. Her kann tað henda, at um TB tapir og ÍF vinnur, so fer ÍF við silvurinum, men TB kann avgera alt sjálvt við at vinna.

# Tromsø á veg í finaluna

**Flogbóltsfelagið Tromsø, har tveir føroyskir spælarar royna seg, vann fyrru hálvfinaluna og skal í morgin taka seinni stigið í finaluna um norska meistaraheitið**

FLOGBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Rúni Weihe og Bárður Bendix Mikkelsen hava annað beinið í finaluni um norska meistaraheitið í flogbólti.

Farna vikuskiftið spældi Tromsø fyrru hálvfinaluna ímóti Nyborg úr Bergen, og tað eyndaðist liðnum hjá teimum føroysku spælarunum at vinna útidystin 3-1.

Tromsø byrjaði dystin illa og tapti fyrsta settið 25-19. Men so kom vend í. Rúni og Bárður løgdu fyri við góðum servum, og tá ið blokkurin eisini kom á rætta lagið, vendi Tromsø dystinum. Næsta settið vann Tromsø heili 25-12.

Í triðja og fjórða setti var munandi tættari, men Tromsø var frammanfyri meginpartin av hesum settum, og teir kláraðu eisini at hála sigurin í land við 25-22 og 25-23.

Seinna hálvfinalan ímóti Nyborg verður leygardagin, og hesaferð spæla Rúni, Bárður og liðfelagarnir á heimavølli.

**Dystir um vikuskiftið**

**HONDBÓLTUR**
**Sunset-kappingin**
**finala**

| Dagur | Klokkan | Dystur | Dómari |
|---|---|---|---|
| 19.03 | | Neistin-Stjørnan | |

**FLOGBÓLTUR**
**Meistaradeild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 18.03 | 14.00 | ÍF-SÍ | TB |
| 18.03 | 14.00 | Mjølnir-Dráttur | TB |
| 19.03 | 15.00 | TB-KÍF | SÍ |

**Meistaradeild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 18.03 | 16.00 | ÍF-SÍ | Nøvan |
| 18.03 | 16.00 | Mjølnir-Fleyr | Nøvan |

**FÓTBÓLTUR**
**Kappingin um Løgmanssteypið**

| | | |
|---|---|---|
| 18.03 | TB-Royn | Páll Augustinussen |
| 18.03 | Fram-NÍF | Ransin N. Djurhuus |
| 18.03 | FSV04-AB | Eiler Rasmussen |
| 18.03 | SÍ-MB | Georg N. Rasmussen |

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Davidson skjótastur fríggjadag

**Við fimm ymiskum bilum á teimum fimm fremstu plássunum í fríggjadagsvenjingini, áðrenn formel 1 koyringina á Sakhir breytini í Kuala Lumpur, Malaysia, tykist alt at vera opið áðrenn koyringina.**

FORMEL 1

Í fjør kappaðust fríggjadagskoyrarnir hjá McLaren og Toyota um skjótastu tíðirnar fríggjadag. Men av tí, at McLaren og Toyota endaðu millum tey fýra fremstu liðini í fjør, hava tey í ár ikki loyvi at hava ein triðja royndarkoyrara við fríggjadag. Í ár hava Honda og Williams aftur fingið loyvi, at hava ein triðja koyrara við, tí liðini endaðu uttan fyri fýra tey fremstu í fjør. Trendurin heldur fram í ár, tí hesir áttu eisini skjótastu umførini. Alexander Wurz í Williams Cosworth hevði skjótastu tíðina, inntil fá sekund vóru eftir, tá Anthony Davidsson í Honda fór um málstrikuna við tí allar skjótastu tíðini. Renault bilurin hjá Fernando Alonso var á triðja plássið, Felipe Massa í Ferrari var á fjóra plássi og Räikkönen í McLaren-Mercedes var fimtur.

Anthony Davidson var alt kappingarárið 2004 skjótastur fríggjadagar. Við skjótastu tíðini bæði í Bahrain og nú í Kuala Lumpur tykist tað, sum um hann ætlar at endurtaka bragdið.

Í koyringini seinastu viku koyrdi Nico Rosberg í Williams Cosworth skjótasta umfarið í sjálvari koyringini, Williams fekk somuleiðis báðar koyrararnar í stigini á sætta og sjeynda plássi. Við næst skjótastu tíðini í dag, vísir Williams at liðið skal takast við álvara. Fólk hava tosað um, at Renault, Ferrari, McLaren og Honda fara at stríðast um sigrarnar í ár. Men kanska Williams fer at blanda seg í hetta stríð.

Annars var koyringin merkt av, at nógvir av koyrarunum bert koyrdu fá umfør, fyri at spara motorin. Nógvi hitin í Kula Lumpur er ein stórur trupulleiki fyri motorarnir, ið longu hava koyrt eina heila koyring í Bahrain. Tí geva tíðirnar óivað bert nakrar ábendingar, ístaðin fyri nakra serliga álítandi mynd av hvussu leikur ferst.

**Úrslit av fríggjadags royndarkoyring**

1 Anthony Davidson Honda 1:35.041
2 Alexander Wurz Williams-Cosworth 1:35.388
3 Fernando Alonso Renault 1:35.806
4 Felipe Massa Ferrari 1:35.924
5 Kimi Räikkönen McLaren-Mercedes 1:36.132
6 Giancarlo Fisichella Renault 1:36.182
7 Michael Schumacher Ferrari 1:36.617
8 Jenson Button Honda 1:36.661
9 Jacques Villeneuve Sauber-BMW 1:37.045
10 Rubens Barrichello Honda 1:37.270
11 Jarno Trulli Toyota 1:37.317
12 Nick Heidfeld Sauber-BMW 1:37.418
13 Robert Kubica Sauber-BMW 1:37.457
14 Juan Pablo Montoya McLaren-Mercedes 1:37.463
15 Vitantonio Liuzzi STR-Cosworth 1:37.590
16 David Coulthard RBR-Ferrari 1:37.603
17 Ralf Schumacher Toyota 1:37.695
18 Neel Jani STR-Cosworth 1:37.831
19 Scott Speed STR-Cosworth 1:37.926
20 Mark Webber Williams-Cosworth 1:38.081
21 Nico Rosberg Williams-Cosworth 1:38.205
22 Giorgio Mondini MF1-Toyota 1:38.256
23 Christian Klien RBR-Ferrari 1:38.644
24 Christijan Albers MF1-Toyota 1:38.918
25 Robert Doornbos RBR-Ferrari 1:39.105
26 Tiago Monteiro MF1-Toyota 1:39.416
27 Takuma Sato Super Aguri-Honda 1:41.549
28 Yuji Ide Super Aguri-Honda 1:43.164